# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# FÓLKASKÚLIN LÍKA VÍTT SUM SÍTT

Eingin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldi gistir, sigur orðatakið – og hesi orð kunnu vit nýta í so mongum samanhangi. Í politikki kunnu vit ofta sanna orðini – tí tað er sera løgið, hvussu politisk viðurskifti kunnu hátta sær.

Tað eru ikki meira enn tvey ár síðani, at tey stórtíðindi bórust, at nú vórðu játtaðar 2,4 milliónir meira til Føroya Læraraskúla, sum skuldu brúkast til at taka tveir flokkar inn av bæði lærararalesandi og pedagoglesandi. Grundgevingin var, at tørvurin á lærarum og námsfrøðingum var so stórur.

Eisini vóru játtaðir fleir tímar til fólkaskúlan, tí nú skuldi fáast skil á vánaliga úrslitinum, sum PISA-kanningar góðu í føroyska fólkaskúlanum. Fleiri undirvísingartímar merkti eisini fleiri lærarastørv.

Men nú, tá hesi báðir lærararaflokkar lesa á øðrum ári, er vent í holuni. Nú er als eingin tørvur á lærarum. Helena Dam á Neystabø sigur kortini, at eingin vandi er fyri arbeiðsloysi millum lærarar, tí so nógv ófaklærd fólk eru í fólkaskúlanum. Fimmti størv verða færri næsta ár – og hon væntar, at tað bara verða tey ófaklærdu, eftirløntir lærarar og lærarar sum lesa yvirtímar, sum verða við sviðusoð av hesum. Livst so spyrts.

Vit kunnu kortini staðfesta, at fólkaskúlin er á vandakós. Tann bati, sum kom eftir PISA-kanningarnar, er longu droppaður á fleiri skúlum. Teir tímarnir, sum fyrsti, annar og triðji flokkur fekk oman á tímatalvuna, eru spardir burtur á fleiri skúlum, sum harvið eru komnir líka vítt sum sítt – um annars nakað høpi var í mætu ætlanunum at fáa frægari PISA-úrslit.

Ætlanirnar hjá landsstýriskvinnuni at útvega fólkaskúlanum fleiri pengar við at niðurleggja smáar skúlar tyktuskt eisini sera áhugaverdar. Eisini tí at lærarafelagið var í einum positivum dialogi um hetta. Men glæsiligu ætlanirnar um at útvega skúlanum



fleiri pengar eru nú blivnar til sparitiltøk, og harvið steðgar helst tann dialogurin við lærarafelagið.

Politiska kabalin skal ganga upp. Óplanlagdi fíggjarpolitikkurin seinastu árini, har politiska skipanin hevur skorið inntøkur burtur uttan at tryggja nýggjar inntøkur ístaðin, setir síni spor. Eins og við nýggju klæðum keisarans á sinni, so skuldi trøini vaksa inn í himmalin – og tí fær »fíggjarkreppan« skuldina – eisini fyri tann óplanlagda fíggjarpolitikkin í Føroyum síðani kreppuna fyrst í nítiárunum.

Eftir stendur, at fólkaskúlin er bumbaður aftur í tíðina. Í øllum førum aftur til ringu PISA-úrslitini, og tað er spell. Serliga tí, at hetta rakar veiku næmingarnar meinast.

## Glæsiligar ætlanir blivu til sparingar

# Astrup tapti eisini í Hægstarætti



Tryggingartakararnir í danska tryggingarfelagnum »Tryg« fáa ikki tær 25 milliardir kónurnar, sum teir høvdu kravt. Hægstirættur staðfesti í dag dómin hjá Eystara Landsrætti, sum segði, at tryggingartakararnir hava ikki rætt til pengarnar.

Teir misnøgdu tryggingartakararnir við fyrrverandi Føroya Banka-stjóranum Jørn Astrup Hansen á odda hildu uppá, at teir høvdu krav upp á pengarnar, men tað heldur dómsvaldið ikki.

Stríðið um teir nógvu pengarnar byrjaði, tá Tryg-Vesta blev skrásett á virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn fyri fimm árum síðani. Jørn Astrup Hansen og hansara stuðlar hildu uppá, at felagið skuldi rinda sínum tryggingartakarum tær nógvu milliardirnar, men í dag hevur Hægstirættur endaliga staðfest, at tey fáa ikki pengarnar.

# Jóannes Nolsøe í Havnar Kirkju

Leygardagin klokkan 11.30 verður matiné í Havnar kirkju. Jóannes Nolsøe spælir urgu. Hann fer at spæla tónleik eitt nú av Mendelsohn og Peter Møller.

Jóannes Nolsøe hevur fyrr verið urguleikari í Havnar kirkju. Seinastu árini hevur hann starvast við kirkjuna í Skagen. Hann hevur ofta vitjað heima og spælt til konsertir bæði einsamallur og saman við øðrum.





## Ískoyti til málkjakið

VAGNUR MICHELSEN
KJAK Á SÍÐU 14



## Framstig fyri ungdómin

LEVI MØRK
KJAK Á SÍÐU 15

# Løgmaður á ríkisfund

Kaj Leo Johannesen, løgmaður, og frú Jórun Johannesen fara í dag til Danmarkar at luttaka á árliga ríkisfundinum saman við danska forsætismálaráðharranum, Lars Løkke Rasmussen og grønlendska landsstýrisformanninum, Kuupik Kleist. Fundurin verður í ár á Ruths Hotel í Skagene í morgin og fríggjadagin.

Á skránni fyri ríkisfundin eru m.a. viðurskiftini millum Føroyar og ES, uppskotið til føroyska stjórnarskipan, føroyskur limaskapur í WTO og uttanríkispolitiska virkisføri hjá Føroyum.

Undir ríkisfundinum verður eisini árligi fundurin í Samstarvsnevndini millum Løgmansskrivstovuna og danska forsætismálaráðið. Samstarvsnevndin, ið er mannað við embætisfólkum, viðgerð mál viðvíkjandi viðurskiftum millum Føroyar og Danmark.

Løgmaður verður aftur í Føroyum sunnudagin 13. juni.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*